## B71 nýggjan formann

B71 fekk mánakvøldið nýggjan formann. Ársaðalfundur var, og hóast undirtøkan fyri fundinum ikki var tann stóra, eydnaðist tað at manna nevndina. Eli Hentze, sum hevur verið formaður, verður nú næstformaður, meðan nývaldi Ragnar Fossdalsá verður nýggjur formaður í B71. Hinir í nevndini eru Hans F. Hansen, Bergleif Sólsker og Magnus Olsen.

## Verjan var í gávuhýri

Danska felagið Frem spældi um vikuskiftið javnleik 4-4 ímóti einum svenskum 3. deildarliði. Heimasíðan hjá Frem skrivar, at verjan hjá liðnum var í gávuhýri, og hvørki verjuspælararnir ella málmaðurin høvdu sínar bestu dagar. Atli Gregersen var annar av miðverjunum, sum byrjaði á vøllinum, meðan Jónas Tór Næss ikki var við frá byrjan hesaferð

## Rógvi endaði í miðverjuni

KR spældi mánadagin ímóti Brann í La Manga Cup, og dysturin endaði við javnleiki 1-1. Hetta var triði dysturin hjá KR á La Manga, og fyrsti dysturin har tað eydnaðist at fáa stig. Undan hesum dystinum hevði KR tapt 1-0 ímóti Tromsø og 4-2 ímóti Krylia Sovetov. Longu í fyrra hálvleiki av dystinum mánadagin noyddust tveir spælarar hjá KR út við skaða, og tað hevði við sær, at Rógvi Jacobsen, sum byrjaði dystin á miðvøllnum varð settur í miðverjuna at spæla. Rógvi er nú farin til USA, har hann verður á venjingarlegu saman við føroyska landsliðnum næstu 10 dagarnar.

## ÍF nýggjan formann

Mortan Thomsen er nýggjur formaður í aðalnevndini hjá ÍF. Ítróttarfelagið í Fuglafirði umfatar fótbólt, flogbólt og badminton, og nevndir eru fyri einstøku ítróttargreininar eisini. Í aðalnevndini sita nú Mortan Thomsen, formaður, Maus Túgvustein, næstformaður, Bogi Nón, kassameistari og Petur við Gjónna, skrivari.

# Jón Rói hevur gott mót

**Skaddi landsliðsspælarin í AaB hevur sett sær fyri at verða klárur at spæla, tá ið superligan byrjar miðskeiðis í mars mánaði**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Jón Rói er farin at venja saman við liðfeløgunum aftur, og haraftur venur hann eyka í venjingarhølunum fyri at styrkja skadda knæið*

*Mynd: aabsport.dk*

Jón Rói Jacobsen er farin í holt við venjingina aftur, eftir at hann fekk ein løst í knæið undir einum venjingardysti hja AaB í Turklandi herfyri.

Løsturin í knæið var tí betur ikki so álvarsligur, sum onkur stúrdi fyri, og nú venur Jón Rói eyka fyri at gerast klárur at spæla aftur.

Fysioterapeturin hjá AaB Henrik Bøgvad og fysiski venjarin Ashley Tootle hava givið Jón Róa eina serliga venjingarskrá, sum hevur til endamáls at styrkja knæið, har hann fekk ein skaða.

### Jón Rói fegnast

Heimasíðan hjá AaB hevur vitjað Jón Róa í venjingarhølunum, og har hittu teir einum bjartskygdum føroyskum landsliðsspælara.

– Sjálvandi er tað gott at kunna venja aftur. Eingin fótbóltsspælari tímir at ganga skaddur, og eg fegnist um, at skaðin ikki hevur verið so drúgvur, sigur Jón Rói.

Hann er farin undir venjingin saman við liðfeløgunum aftur, og haraftur at venur hann eisini fyri seg sjálvan.

– Eg venji bæði saman við liðfeløgunum og fyri meg sjálvan. Eykavenjingin skal styrkja vøddarnar kring knæið, so at eg kann koma rættiliga fyri meg aftur, sigur Jón Rói.

### Klárur í mars

Tá ið Jón Rói fekk skaðan í knæið var vandi fyri, at hann skuldi halda ein langan steðg, men tíbetur gjørdist tað ikki so álvarsamt, og nú hevur Jón Rói sett sær eitt ítøkiligt mál fyri, nær hann skal verða heilt klárur aftur.

– Eg eri optimistur. Eg fái ikki sagt, nær eg verði heilt klárur at spæla aftur, men mítt persónliga mál, at eg kann spæla, tá ið superligan byrjar aftur mitt tí mars, sigur Jón Rói Jacobsen.

Hesa vikuna skulu Jón Rói og teir venja sjey ferðir, umframt at AaB skal spæla ein venjingardyst ímóti Randers FC seinnapartin fríggjadagin.

# Todi varð skeivt endurgivin

**Tíðindastova endurgav Toda Jónsson fyri at siga, at hann vildi aftur til Danmarkar at spæla, men nú avsannar Todi, at hann skal hava sagt hetta**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Um tvey ár eri eg 36 ár. Hetta er mín seinasti sáttmáli, og FC Nordsjælland er ikki upp á tal eftir hendan sáttmálan, sigur Todi Jónsson*

Seinastu dagarnar hava tíðindi gingið um, at Todi Jónsson skuldi fara aftur til Danmarkar at spæla fótbólt. Millum annað norska tíðindastovan NTB bar tíðindini um, at Todi ikki treivst í Noregi, og at hann tí skuldi skifta felag.

Nýggja felagið hjá Toda skuldi sambært tíðindunum vera FC Nordsjælland, sum spælir í superliguni.

Men Todi boðar nú alment frá, at hann hevur einki sagt um hetta.

– Eg eri blivin skeivt endurgivin, og eg skilji ikki, hvussu tað, sum eg havi sagt, kann verða tulkað soleiðis, sigur Todi Jónsson við Fedrelandsvennen.

### Endar í Start

Todi hevur fyri kortum longt sáttmálan við Start fyri restina av hesum árinum, og partarnar hava møguleikan at leingja sáttmálan við einum ári afturat.

– Um tvey ár eri eg 36 ár. Hetta er mín seinasti sáttmáli, og FC Nordsjælland er ikki upp á tal eftir hendan sáttmálan, sigur Todi Jónsson.

Hann sigur seg trívast væl í Start og ætlar at halda sína avtalu við felagið.

Áðrenn Todi fór til Noregs at spæla var hann í sambandi við fleiri donsk feløg, og tað var sagt, at FC Nordsjælland var eitt av feløgunum. Men eingin avtala kom í lag millum partarnar, og nú staðfestir Todi, at tað kemur heldur ikki upp á tal.

Hann ætlar sær at enda sína yrkisleið.

## B71 vil hava felagshús

**Tað gongur heldur striltið hjá B71 at fáa nakað ítøkiligt burtur úr arbeiðnum við einum nýggjum felagshúsi.**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í 2004 setti nevndin í B71sær fyri at gera tekning og ætlan fyri eini nýggj B71-felagshøli, men á aðalfundinum hjá felagnum mánakvøldið segði fráfarandi formaðurin, Eli Hentze, at tað gongur striltið við hesum ætlanum.

Hann segði, at arbeitt veður framvegis við ætlanini, men millum lítið og onki er gjørt við hetta mál síðani seinasta aðalfund.

– Orsøkirnar eru tvær. Nevndin hevur ikki havt nóg stóra orku ella áræði at gera meira við málið, og hin er tann, at sitandi nevnd ivast í projektinum. Eisini tí onkrar politiskar útmeldingar á fundi við kommunustýrislimir í oynni ikki hava verið einvíst jaligar, segði Eli Hentze í formansfrágreiðingini.

– Spurningurin hevur tó verið umrøddur á tveimum nevndarfundum, har vit m.a. hava mett um tørvin. Harumframt hava vit havt samband við Articon og tosað um, hvar bygningurin møguliga skuldi staðið, eisini við atliti til áðurnevndu sitipláss, ið hóskandi kundu verið partur av einum húsaprojekti, segði hann.

## Hendrik breyt fótin

Hendrik Rubeksen hjá HB fekk skaða undir venjingdysti ímóti GÍ í farnu viku. Kanningarnar aftan á hava víst, at fóturin hjá álopssinnaða spælaranum er brotin. Brotið er við lítlutá, og Hendrik skal binda frið frá fótbóltsspæli í ein mánaða, skrivar heimasíðan hjá HB.